Avloysari

Lastbilaførari og farmastøðsfólk

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir avloysararum, sum lastbilførari/farmastøðsfólk til Farmastøðirnar kring landið, summari 2003.

Starvið fevnir um:
- Farmaflutning og farmaavgreiðslu
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

Førleikakrøv:
- Koyrikort til lastbil/trailara
- Trukkprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt
- Góðan røkjuskap

Setanartreytir:
Løn- og setanartreytir verða sambært sáttmálanum millum Figgjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir:
Umsókn við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:
Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn
og skal vera fyritøkuni í hendi innan 8. mai 2003.
Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á Tel 343060 ella t-post: *hab@ssl.fo.*

STRANDFARASKIP LANDSINS
www.ssl.fo

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Stuðul úr lærigrunni Føroya Keypmannafelags

Til útbúgving innan handil og skrivstovu kunnu ungfólk søkja um studning úr lærigrunni felagsins.

Umsóknir saman við váttan frá útbúgvingarstað verða at senda til Lærigrunn Føroya Keypmannafelags, í seinasta lagi 23. mai 2003.

Umsóknarblað fæst á skrivstovuni.

Lærugrunnur Føroya Keypmannafelags
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn
tlf. 311864





FØROYA LÆRARASKÚLI

Læraraútbúgvingin

Vilt tú vera lærari?

Nú er greitt at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501), teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00–16.00.

Treytin fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

LÆRARAÚTBÚGVINGIN
– Ein útbúgving fyri lívið

FØROYA LÆRARASKÚLI

Námsliga útbúgvingin

Vilt tú vera pedagogur?

Nýggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501), teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00–16.00.

Treytirnar fyri upptøku á **námsligu útbúgvingina** eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið í 9 ár í skúla, hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving, ella kann prógva samsvarandi kunnleika.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

NÁMSLIGA ÚTBÚGVINGIN
– Ein útbúgving fyri lívið

M/B Karin KG 716

til sølu um hóskandi boð fæst. Øll loyvir fylgja við.

Báturin hevur verið til høvuðssýn í mars 2003.

Tlf. 456787 ella 259362

VIÐMERKINGAR

Nú rýma teir!

Heini Holm
Borgarstjóri

Fyri einum mánað síðan fingu borgarnir í Kvívíkar Kommunu skriv frá Føroya Sparikassa, har sagt var at deildin í Kvívík stytti um upplatnigartíðina við 17 tímum, ú 20´niður í 3 tímar um vikuna. Grundgevingin var at kundarnir vóru farnir at nýta heimagreiðsluna, FR-kort og audio-respons meir.

Tá man fór at spyrja nærri, fekk man at vita at 3 tímar vóru nokk til at avgreiða kundarnar, ið komu í Fø. Sp.K. fyri vikuna (í praksis ber tað slett ikki til).

Seinni er komið fram at eitt starvsfólk í deildini í Vestmanna er flutt í annað starv í Havn, og at eitt í Kollafirði er farið úr starvi, og tí avgjørdi man at næstan stongja deildina í Kvívík og Hósvík. Fyri fyri hálvum øðrum ári síðan skifti Kvívíkar Kommuna peningastovn aftaná fleiri áheitanir frá leiðslu Sparikassans, og hildu vit tað vera rímiligt eftirsum tað ver einasti penigastovnur í kommununi, og var tað tí sum at fáa vátan vott frammaná, tá brævy var borið í hvørt hús, har fráboðað var um skerjing í upplatingartíðina.

Í kommununi búgva uml. 600 fólk, bankin hevur opið 3 tímar ein dag í vikuni, og eingin Føroya Banki er í kommununi, í Kollafirði búgva uml. 1000 fólk, Sparikassin hevur opið 7 timar hvønn dag (35 tímar um vikuna), við Føroya Banka sum granna. Sama er galdandi fyri deildina í Vestmanna. So ójavnt er býtt, at geva borgarunum í Hósvíkar og Kvívíkar Kommunu so ringa tænastu í mun til aðrar miðalstórar bygdir. Sjálvandi er tað ikki tænastuna teir vinna mest pengar við, tað er við at læna til húsabygging. Men her liggja vit ikki á tí latu síðuni heldur. Í Hósvík byggja teir heil raðhús, í Kvívík eru 8 hús í gerð og onnur 8 eru á veg, og tað eru tað ikki nógvar bygdir sum kunnu vísa á.

Í Vestmanna og Kollafirði er okkurt hendinga hús í gerð. Og meðan eg minnist til tað, eru tað jú manuellar flytingar, ið Stovnurin tjenar nógv uppá og ikki við heimagreiðsluni, so hví stongja, tá so nógv vitja dagliga.

Men ætlanin hjá stovninum er væl at tá tey allarflestu okkara eru farin at nýta heinmagreiðsluna, tá fara gjøld at vera løgd á á hvørja flyting. Og ikki at gloyma avtaluna stovnarnir hava við Landsverkfrøðingin um grótløss o.a. úr grótbrotunum. 60 kr per flyting, og tað SKAL ígjøgnumm peningastovn. Lukrativt, ha?

Nei, tað sær út sum at Sp.K. var úti eftir at, tða teir komu til Kvívíkar at troðka F.B. burtur, ið sum kunnugt eydnaðist, og so at fara avstaðaftur, tá fólk høvdu vant seg til at nýta teir.

Takk fyri og farvæl sýnast teir nú at siga.

Men vit siga eisini farvæl við teir, lata teir ikki deildina upp aftur hvønn dag, ikki bert kommunan men eisin nógvir av privatu kundunum hiðani siga farvæl. Men Fø.Sp. letur ein ventil vera opnan, hava 3 tímar opið um vikuna, til bert forargilsi. Tí skuldi tað hent, at annar stovnur kom til bygdar, kann man altíð økja um upplatingartíðina.

Eg ørminnist um, at Suðuroyar Sparikassi er komin norður um fjørð. Hann er vælkomin longur norður.

Og so var tað posthúsið.

Var boðin til Havnar á fund við leiðslun á Postverkinum, um ætlanirnar teir høvdu við okkara deild. Hugsaði á veg suður hvørjar stórar ætlanir postverkið nú mundi hava. Jú, "ætlanirnar" vístu seg at vera tær at stongja posthúsið. Gjørdi sjálvur ikki meir við málið, ivaleyst tí at man sjálvur og kommunan ikki brúka posthúsið serliga nógv. Eg fekk´jú at við hvussu lítið posthúsið verður brúkt.

Men eftir at hava verið á borgarafundi í Glæmuni í Kvívík, havi eg fingið annað at hugsa um, tí har komu onnur sjónarmið fram, ið leiðslan á Posthúsinum í Havn átti at tikið til eftirtektar. Teir vóru jú við á fundinum. Har kom tað fram, hvussu ójavnar tænasturnar eru frá kommunu til kommunu. 4,5 tímar var tað opið í Kvívík, tað hava teir nú stongt. Men hava 30 tímar opið í Vestmanna (1200 fólk). Eg meini, SO stórur munurkann ikki vera á brúki av posthúsum frá bygd til bygd. Í Kollafirði er opið fyri Kvívík, Kollafirði og Hósvík, 1800 borgarar, 12,5 tímar um vikuna.

Men tað er ikki her trupulleikin hjá Postverk Føroya liggur. Trupulleiki er ein óvuliga konservativ og afturhildin leiðsla, ið er ógvuliga bangin fyri at taka kappingina upp við bankarnar. T.d. har peningastovnarnir lata aftur skuldi Postverkið staðið klárt at lofta ónøgdum kundum, men nei, hugsunaháttурin tykist vera, " her gerst einki, her eru eingir møguleikar, vit eru ikki nóg góðir til at taka yvir, lat okkum bara eisini rýma og stongja, vit hava so nógvar avmarkaðar heimildirsambært postverkslógini, lat okkum bara pakka saman og gevast." Hetta var, ið hvussu so er tað, eg fekk burturúr at lurta eftir umboðunum fyri Postverkið á borgarafundinum.

Teir síggja bert trupulleikar fyri sær, og ongar avbjóðinar og møguleikar. og tað er ikki gott fyri ein stovn, ið ætlandi skal vera eitt alment partafelag innan stutta tíð, ongar visiónir at hava, ongar stórar ætlanir at hava.

Eg heiti á tykkum at lata posthúsið í Kvívík uppaftur, gevi borgarunum í landinum somu sømdir, tað hava vit rætt til, posthúsið er jú alment, ella komi við hasum landpostboðnum um ikki annað, bróti heldur upp ermar enn at rulla niður á skøvningar og gevast á hondum, tí so geva tit peningastovnunum frítt spæl, gevi teinum mótspæl, bjóði teimum av, fari til verka. NÚ!!



Hjá Føroya Sparikassa hava allir brikkar týdning. Stórir sum smáir. Nú søknast vit eftir nýggjum týðandi brikkum soleiðis, at putlispæl okkara skal ganga upp.

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privat- um og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit vænta, at tú ert lívlig/ur og óhátíðarlig/ur. Tú ert ein eldhugaður bólkaspælari og kennir, at sjálvsábyrgd og góð tillaging- arevni skapa íblástur.

Vit vilja skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og menn- ast. Vit leggja serstakliga dent á opið og ærligt prát. Tað er við til at menna felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Við útbúgving í Føroya Sparikassa fært tú eisini førleika til at starvast innan aðrar vinnur. Ella tú brúkar útbúgvingina sum lopfjøl til víðari útbúgving. Tó stremba vit sjálvandi eftir, at tú framhaldandi vilt vera á okkara liði, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Sparikassin hevur eisini fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

Í næmingatíðini ert tú við í prógvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Starvsfólkadeildina, tlf. 348510.

Send umsóknina við avriti av prógvskjølum til adressuna niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. mai 2003 kl. 18.00.

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

www.sparikassin.fo
E-mail: starvsfolkadeildin@sparikasssin.fo

FØROYA SPARIKASSI